# Rúsdrekkalógin verður ikki broytt

**Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri, hevur ongar ætlanir um at broyta lógina um sølu av rúsdrekka, soleiðis at bryggjaríini missa møguleikan at selja úr goymslum sínum. Hann heldur tað vera óheppið at familju- og trivnaðarmálaráðharrin hevur skapt órógv í føroysku bryggjarívinnuni**

RÚSDREKKASØLA
*Rúnar Reistrup*

Herfyri segði segði Bill Justinussen, familju- og trivnaðarmálaráðharri, at eftir hansata tykki áttu ølsølurnar hjá bryggjaríunum at verið niðurlagdar, millum annað tí tær hava ringa ávirkan á umhvørvið, har tær liggja. Tað skapti ørkymlan millum bryggjaríini, sum søgdu seg bera ein ávísan ótta fyri, hvat landsstýri kundi finna uppá hesum viðvíkjandi.

- Man skal ansa eftir at man sum ráðharri ikki skapar órógv í einari vinnu, og tí er tað ikki serliga heppið at familju- og trivnaðarmálaráðharrin úttalar seg um at bryggjaríini áttu at mist rættin at selt øl til privatfólk, heldur Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri.

### Rúsdrekkalógin virkar væl

Bjarni Djurholm er varugur við, at allir ráðharrar hava sín fulla rætt til at úttala seg um málsøkini hjá hvørjum øðrum, og at Bill Justinussen sum ráðharri við trivnaðarmálum hevur eitt orð at siga um rúsdrekkalóggávuna. Men hann heldur tað vera skeivt av øðrum ráðharrum at leggja seg ov nógv út í málini hjá hvørjum øðrum.

- Eg umsiti vinnumál og tí er tað natúrligt at møguligt uppskot um broytingar í rúsdrekkalóggávuni koma frá mær. Og í verandi støðu havi eg ongar ætlanir um at broyta nakað, tí lógin frá 1992 hevur víst seg at liva fult upp til endamál sítt, sigur vinnumálaráðharrin.

Bjarni Djurholm vísir á, at hagtøl frá Rúsdrekka & Narkotikaráðnum vísa, at samlaða rúsdrekkanýtslan ikki er økt síðan rúsdrekkaøkið varð liberaliserað í 1992, tá Rúsdrekkasøla Landsins varð sett á stovn, og bryggjaríini fingu loyvi at selja egnar vørur.

# Fyribyrging er vegurin fram

**Familju- og trivnaðarmálaráðharrin, Bill Justinussen, ætlar sær komandi fýra árini at arbeiða miðvíst við at ávirka føroyska hugburðin um rúsandi evnir. Hetta skal gerast við upplýsing og ráðgeving, sum skal umfata allar landsins borgarar. Fólkaupplýsingina skal byrja longu í barnaúrunum**

FYRIBYRGING
*Rúnar Reistrup*

Bill Justinussen, familju- og trivnaðarmálaráðharri, ætlar at taka ítøkilig stig fyri at fyribyrgja, at fólk koma út í rúsevnismisnýtslu. Og at tað fer at merkjast hjá vanliga føroyinginum at sitandi landsstýri hevur sett ein ráðharra at taka sær av familju- og trivnaðarmálum, skal eingin vera í iva um, tí í framtíðini skulu allir borgarar umfatast av fyribyrgingartiltøkum til frama fyri at koma misnýtsluni av alkohol og øðrum euforiserandi evnum til lívs.

- Fyribyrgjandi upplýsing, ráðgeving og hjálp eigur at umfata allar borgarar, tí allir borgarar eru potentiellir misnýtarar, sigur Bill Justinussen.

Hann er varugur við vandan við at ávís fólk, millum annað tey, sum javnan nýta alkolohol, men ikki uppfata sítt brúk sum misbruk, kunnu kenna seg gingin ov nær av slíkum fyribyrgjandi tiltøkum, men ætlar ikki at setast aftur av teirri orsøk.

- Vandi er altíð fyri, at fólk kenna seg gingin ov nær. Fólk vilja jú gjarna sjálv seta mørkini, heilt til tey missa tamarhaldið á støðuni, og myndugleikarnir mugu trakka til. Tí fær man eftir mínum tykki ongantíð fyribyrgt ov nógv, sigur Bill Justinussen.

### Fyribyrging í skúlum og barnaansing

At fyribyrgja misnýtslu er sambært Bill Justinussen millum annað at koma á tal við fólk, áðrenn tey koma í samband við rúsandi evnir, og tí hevur familju- og trivnaðarmálaráðharrin vent kikaranum ímóti almennu uppalingarstovnunum.

- Fyribyrging eigur at byrja longu tíðliga í barnaárunum. Okkurt eigur at verða gjørt longu í almennu barnaansingarstovunum, og undir øllum umstøðum eigur fyribyrgjandi virksemi at vera partur av skúlanum, møguliga sum sjálvstøðug lærugrein ella sum partur av øðrum lærugreinum, sigur familju- og trivnaðarmálaráðharrin.

- Eg veit at í hesum flyti eg meg inn á øki hjá mentamálaráðharranum, men tá man sum eg situr við familju- og trivnaðarmálum, má man allatíðina arbeiða saman við hinum ráðharrunum fyri at kunna fremja ítøkilig tiltøk.

### Fíggjarligir fyrimunir við fyribyrging

Familju- og trivnaðarmálaráðharrin sær eisini fíggjarligar fyrimunir í virknari fyribyrging.

- Kanst tú fyribyrgja at tíggju fólk fáa heilsuskaðar av rúsevnismisnýtslu, so hevur tú longu vunnið nógv. Um so hesi tíggju fólkini verða til sunnar og arbeiðandi samfelagsborgarar, so eru vit í teirri støðu, at fólk, sum annars høvdu kostað samfelagnum, ístaðin lata sítt til samfelagsbúskapin, og tá eru nógvir pengar spardir, sigur Bill Justinussen, familju- og trivnaðarmálaráðharri.

# Føroya Bjór byggir sølubúð

**Føroya Bjór segði seg einaferð gera veðrið betri, men nú byggir fyritøkan eitt útsøluhøli afturat goymslubygninginum í Havnardali fyri at verja viðskiftafólkini frá regni og vindi**

SØLA
*Rúnar Reistrup*

Føroya Bjór er farið undir at byggja eina sølubúð afturat goymsluni í Havnardali. Higartil er øl- og sodavatnssølan farin fram um ein lítlan handilsdisk mitt í goymsluni, men fyri at gera tað eitt sindur høgligari fyri viðskiftafólkini og samstundis fáa meira goymslupláss, hevur Føroya Bjór valt at byggja ein útbygning, ið skal hýsa eini sølubúð.

- Vit hava eitt ynski um at gera eina meira praktiska og presentabla útsølu í Havnardali, og tí hava vit valt at byggja eitt lítið útsøluhøli afturat goymslubygninginum, sigur Einar Waag, stjóri fyri Føroya Bjór.

Útsøluhølið, sum verður einar hundrað fermetrar til støddar, verður ikki nøkur glæstriborg, lovar bryggjarístjórin.

- Tað verður ein discounthandil. Vit ætla ikki at gera nakað stórvegis burturúr útsjóndini. Høvuðsendamáli við útbyggingini er at fáa eina skjótari avgreiðslu, sigur Einar Waag.



*Her á goymsluni hjá Føroya Bjór í Havnardali verður sølubúð bygd*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



## VIÐMERKINGAR

# Fiskidagauppboðssølan einaferð enn

**Jóannes Jacobsen**
*Búskaparfrøðingur*

Fyri at endurtaka tað, sum er sagt nógvar ferðir, men sum nøkur hava meira enn óalmindiliga trupult við at skilja, so leggur uppskotið hjá Búskaparráðnum um eina nýggja fiskidagaskipan ikki upp til at leggja skatt á nakran, men at eitt avmarkað tilfeingið (umleið 100 túsund tons um árið), sum er »ogn Føroya fólks« verður selt fyri marknaðarprís á eini uppboðssølu, ístaðin fyri sum nú at verða givið burtur.

Hetta eru bara nakrar viðmerkingar til, at Reiðarafelagið veit at siga, at »Marner og Hermann [fáa ikki] serliga góðan karakter fyri uppskot teirra [um fiskidagauppboðssølu]« frá einum »óheftum fíggjarfrøðingi«, sum Reiðarafelagið »lat..hyggja at uppskotinum [hjá Búskaparráðnum]«. Ein umrøða av øllum niðurstøðunum, ið »óhefti fíggjarfrøðingurin« fær burtur úr at lesa uppskotið, hevði gjørt greinina nóg langa til at fingið sjálvt mest eldhugaða lesaran at sovna. Tí skulu bara tær mest skeivu niðurstøðurnar fáa nøkur orð á vegnum.

### Teori og praksis

Fíggjarfrøðingurin hjá Reiðarafelagnum førir fram, at »her er talan um teoretiskar hugsanir, har tað ikki í nóg stóran mun er tikið hædd fyri praktiskum avleiðingum.« Hetta er heilt við síðuna av. Tað er júst fyri tær praktisku avleiðingarnar av eini gjøgnumføring av uppskotinum ella eini líknandi skipan í verki, at uppskotið varð sett fram. Meira um hetta niðanfyri.

Hann heldur fram, at uppskotið er »alt ov teoretiskt og samstundis órealistiskt«. Uppskotið er teoretisk, skilt á tann hátt, at tað byggir á væl grundaða búskaparfrøði. Men samstundis er tað eisini rættuliga fullfíggja við nágreiniligum tilmælum um, hvussu skipanin kundi verðið gjøgnumførd í verki. Hetta viðgongur figgjarfrøðingurin sjálvur, tá hann kallar uppskotið ein »lidnan masterplan«. Tað er tó sjálvsagt ikki lidnari enn so, at tað bara eru grundleggjandi tankarnir um sølu av fiskatilfeinginum heldur enn burturluting, sum eru ófrávíkiligir. Alt annað í uppskotinum er bara tað, eitt uppskot.

Um uppskotið er órealistiskt ella ikki, avhongur av politiska viljanum til at gera nakað við tað. Og sum Reiðarafelagið leikar í, letur til at felagið er bangið fyri, at politiski viljin er við at skifta yvir til at vilja gera nakað við tað.

At fiskifrøðingurin »kann ikki síggja nakra meining í at almannakunngera eitt slíkt uppskot, tí tað kann ikki væntast at fáa eina positiva reaktión« tykist heldur løgið. Uppskotið hevur fingið góða móttøku nógvastaðni, um enn ikki øll hava verið líka harðmælt í sínum viðmerkingum sum summi. Hví brúkar Reiðarafelagið annars so nógva orku upp á at vísa tí aftur? Haraftrat er Búskaparráðið sett til at koma við tilmælum út frá búskaparfrøðiligum greiningum, ikki út frá metingum um, hvørt tilmælini fara at falla í góða jørð hjá einstøkum áhugabólkum ella ikki.

### Prinsippini eru kend

»Prinsippini eru kend, men tey hava ongastaðni vunnið frama í veruleikanum«, sigur fíggjarfrøðingurin. Prinsippið í uppskotinum er, at eigarin av einum tilfeingi við búskaparligum virði skal ikki geva tað burtur, men selja ella leiga tað út fyri marknaðarprís. Hetta er tað sum jarðareigarar gera við sína jørð, tað arbeiðstakarar gera við sín arbeiðsførleika, tað borgarar gera við sín sparipening, tað reiðarar gera við teir fiskidagar, sum teir ikki brúka sjálvir, tað skipini gera við fiskaða fiskin, tað flakavirkini gera við viðgjørda fiskin osfr. osfr.

At siga, at prinsippið í uppskotinum ongastaðni hevur vunnið frama, er tí loddrætt lygn. Prinsippið er tað mest brúkta yvirhøvur innanfyri búskaparligt virksemi. At eigarin av tilfeinginum í hesum førinum er »Føroya fólk«, heldur enn ein einstaklingur, og at tilfeingið er fiskur í sjónum, heldur enn okkurt annað tilfeingið, eigur at vera líkamikið. Prinsippið er tað sama hvørja ferð.

### Tilfeingisrenta og effektivisering

»Tilfeingisrenta er, um hon varð innførd, heilt einfalt at rokna sum at leggja skatt á vinnuna. Tí kann hetta ongantíð nýtast sum grundgeving fyri at effektivisera vinnuna.« Til hetta er at siga, at tilfeingisrenta ikki ein skattur, sum verður innførdur av nøkrum. Tilfeingisrenta er tað marknaðarvirðið, eitt avmarkað tilfeingið fær orsakað av eftirspurningi eftir tilfeinginum.

Tað er ikki bara fiskur í sjónum ella olja í undirgrundini, sum innihalda tilfeingisrentu. Alt avmarkað tilfeingi, sum eftirspurningur er eftir, inniheldur tilfeingisrentu, líkamikið um hetta virðið verður kallað tilfeingisrenta ella okkurt annað. Spurningurin er bara um eigarin av tilfeinginum krevur marknaðarprís fyri tilfeingið ella ikki. Arbeiðarin krevur marknaðarprís fyri sína arbeiðstíð, skipini krevja marknaðarprís fyri landaða fiskin, bilasølan krevur marknaðarprís fyri bilarnar osfr. osfr. Higartil hevur »Føroya fólk« ikki kravt marknaðarprís fyri sítt tilfeingi, men heldur latið reiðarum tað ókeypis og harvið givið teimum óbeinleiðis studning.

Tað er hesa gávugeving Búskaparráðið mælir til at steðga, fyri at effektivisera fiskivinnuna og alt føroyska vinnulívið sum heild. Fiskiskapur er ikki ein vinna, sum søguliga hevur havt vánaligan rentabilitet hóast nógvan beinleiðis og óbeinleiðis studning. Fiskiskapur og fiskivinna sum heild hava havt vánaligan rentabilitet orsakað av studninginum.

Líkamikið um fíggjarfrøðingurin hjá Reiðarafelagnum skilir tað ella ikki, er týdningarmesta fortreytin fyri effektivisering av fiskivinnuni, at reiðaríini eins og allar aðrar fyritøkur rinda marknaðarprís fyri alt tilfeingi, sum tey brúka í síni framleiðslu, tað vil siga eisini fyri fiskin í sjónum.

### Søla ella útleigan

Fíggjarfrøðingurin vil vera við, at ikki ber til at samanbera sølu av fiskidøgum/loyvum og oljuloyvum, »tí í okkara parti av heiminum verða oljuloyvi nettupp ikki seld«. »Í summum londum verður kravdur ein eykaskattur (royalty), [men] her er talan um avmarkað tilfeingi og ónormalt stóran vinning tá er talan um skatt av realiseraðum vinningi og ikki av forværtaðum vinningi, soleiðis sum hetta auktiónssystemið [hjá Búskaparráðnum] leggur upp til.«

Her eru fleiri ting, sum krevja eina viðmerking. Uppkrevjing av royalty av framleiðsluvirði og søla av olju í undirgrundini gjøgnum sølu av einum oljuloyvi eru bara tveir ymiskir hættir at innkrevja gjald fyri avhending av oljutilfeinginum frá upprunaeigaranum til ein annan eigara. Í fyrra førinum verður tilfeingisrentan kravd inn, so hvørt framleiðslan hendir, meðan søla inniber uppkrevjing av allari tilfeingisrentuni í einum. Fyrri framferðarhátturin er tann vanliga nýtti í Europa, meðan tann seinni er vanligur í til dømis Norður- og Suðuramerika. Í hvørgum føri er talan um ein skatt.

### Forvæntað og realiserað

At uppskotið hjá Búskaparráðnum leggur upp til at gjaldast skal fyri tilfeingið upp á forvæntaðan heldur enn realiseraðan vinning, er ikki so løgið, tí mest sum alt vinnuligt virksemi arbeiðir útfrá ætlanum um forvæntaðan vinning. Skip til fiskiskap, bygningar til matvøruhandlar, maskinur til gerð av undirsjóvartunlum, arbeiðsfólk til flakavirkir, rávørur av alskyns slag, fiskidagar og –loyvir frá einum reiðarii til eitt annað osfr. osfr. verða keypt ella leiga upp á forvæntaðan vinning hjá keyparanum. Hví skal tað vera annaðleiðis fyri fiskatilfeingi, sum »Føroya fólk« selur?

### Støddin einki at siga

Um vinningurin av framleiðsluni við einum tilfeingi er »ónormalt stórur« ella ikki hevur einki við sakini at gera. Hvør krevur, at ein fyritøka bara skal gjalda rentur av sínum lánum ella gjalda sínum arbeiðsfólkum løn, t.e. tilfeingisrentu, tá vinningurin hjá fyritøkuni er »ónormalt stórur«? Støddin á vinninginum av nýtslu av einum tilfeingi hevur bara ávirkan á, hvussu høgur ella lágur søluprísurin á tilfeinginum verður, ikki um tilfeingi skal seljast ella ikki. Og at marknaðurin sjálvur eigur at avgera, hvussu høgur ella lágur søluprísurin á tilfeinginum skal vera, út frá væntanum um, hvørt vinningurin verður stórar ella lítil, er høvuðsorsøkin til, at Búskaparráðið skjýtur upp at selja tað á uppboðssølu.

Tilfeingisrentan kann ikki mátast útfrá yvirskoti ella undirskoti hjá teimum fyritøkum, sum gagnnýta tilfeingið. Hon kann bara mátast útfrá, hvat tilfeingið kann seljast fyri á einum fríum marknaði. Virðið á einum kassa av fiski á uppboðssøluni á Toftum kann ikki mátast utfrá yvirskotinum ella undirskotinum hjá flakavirkinum, sum keypir kassan, men bara útfrá hvat flakavirkið rindar fyri hann.

Á sama hátt kann virðið, t.e. tilfeingisrentan, á einari ávísari nøgd av fiski, sum svimur í sjónum, ikki metast útfrá yvirskotinum ella undirskotinum hjá reiðaríinum, sum fiskar fiskin, men bara útfrá hvat henda nøgdin kann seljast fyri. At »føroyski fiskiflotin ikki enn hevur nøktandi rentabilitet til at endurnýggja seg sjálvan« er óviðkomandi fyri prinsippið um, at fiskur í sjónum sum einhvør onnur vøra skal seljast og ikki gevast burtur, hóast rentabiliteturin sjálvsagt hevur ávirkan á prísleguna. Annars er miðal rentabiliteturin hjá fiskiflotanum heldur ikki verri enn so, at fiskidagar í dag kosta kanska einar 4000 krónur í miðal, tá reiðaríir selja dagar innanhýsis, so tað letur til at reiðaríini bæði kunnu og vilja gjalda fyri fiskin í sjónum.

### 0 krónur kilo

At ein lágkonjukturur »átti at ført við sær, at prísurin [á fiskidøgum] gjørdist negativur«, og at »hetta førir beinleiðis studning við sær«, er ikki rætt. Negativur prísur merkir, at eigarin av tilfeinginum rindar fyri at sleppa av við tað. Hetta verður ikki neyðugt við fiskinum undir Føroyum. Í ringasta føri fellur prísurin niður til 0 krónur fyri kilo, sum svarar til at fiskurin verður givin burtur á sama hátt, sum gjørt verður í dag. Tað hava ongantíð verið trupulleikar við at finna keyparar til hendan, fyri keypararnar sera lagaliga, prísin.

### Óvissa um framtíðina

Fíggjarfrøðingurin er ósamdur við Búskaparráðið um, at »øll fara at bjóða ein prís, har marginalkostnaðurin svarar til marginalinntøkurnar«, »tí í praksis eru inntøkurnar ikki kendar fyrr enn dagarnir eru brúktir«. Í øllum lívsins viðurskiftum er óvissa um framtíðina, eisini innanfyri búskaparligt virksemi, og tað vita búskaparfrøðingar líka væl sum øll onnur. Tað, sum meint verður við, er tí sjálvsagt, at reiðaríini fara at bjóða ein prís, har forvæntaði marginalkostnaðurin svarar til forvæntaðu marginalinntøkurnar. Tað er júst hetta reiðaríir gera, tá tey keypa fiskidagar og -loyvir frá hvørjum øðrum. Um reiðaríini keypa fiskidagarnar frá »Føroya fólki« heldur enn frá hvørjum øðrum ger í sær sjálvum ongan mun viðvíkjandi óvissuni um marginalkostnaðir og -inntøkur.

### Sum ein og hvør onnur vinna

Fiskiloyvir, t.e. pakkar við fiskidøgum, vera í dag seldir millum reiðaríir sum ein og hvør onnur rávøra. Hetta er sum tað skal vera. Endamálið við fiskivinnupolitikkinum eigur at vera, at fiskivinnan sum heild og fiskiskapur serliga, skulu viðfarast sum ein og hvør onnur vinna. Næsta stig á leiðini at røkka hesum máli eigur at vera, at upprunaeigarin av týdningarmestu rávøruni hjá fiskivinnuni selur hana á einum fríum marknaði, heldur enn gevur hana burtur til útvald, soleiðis sum gjørt verður í dag.

